# Ravmagn orsøk til eldsbruna

**Stórur materiellur skaði stóðst av eldinum, sum í gjárkvøldið kyknaði í handilsbygninginum hjá Bærendsen Teknik á Trongisvági.**

ELDSBRUNI

Um klokkan seks í gjárkvøldið vórðu boð send eftir sløkkiliðnum á Tvøroyri, tí eldur var kyknaður í handilsbygningin hjá Bærendsen Teknik í Trongisvági. Sløkkiliðið kom skjótt á staðið og sløkti eldin skjótt og væl:

– Tað var tó neyðugt at bróta takið upp fyri at sleppa til, sigur Oddur Dimon, brandmeistari á Tvøroyri.

Eldurin í bygninginum hjá Bærendsen Teknik kyknaði á loftinum, har handilin hevur stóra vørugoymslu. Materielli skaðin á vørugoymsluni er stórur, men eisini hevur handilin í neðra fingið stóran vatnskaða:

– Vit meta, eldurin er kyknaður av ravmagni á vørugoymsluni, leggur Oddur Dimon afturat.

**- horsdal**



*Sløkkiliðið noyddist at bróta takið upp fyri at sleppa til, tá eldur kyknaði hjá Bærendsen Teknik í Trongisvági í gjárkvøldið*

*Mynd: Lýsing*




## Føroya størsta tjald aftur á Summar Festivalin

Risastóra tjaldið, sum varð brúkt á Summar Festivalinum í fjør, verður við aftur í ár. Eini 4000 fólk passa inn í tjaldið, har tann eini av pallunum á festivalinum verður Í fjør hevði Summar Festivalurin eitt risastórt tjald til umleið 4000 fólk.

Í tjaldinum var tann eini av pallunum á festivalinum, og royndirnar við hesum vóru so góðar, at festivalurin aftur í ár fer at brúka hetta tjald, sum verður leigað úr Danmark.

– Tjaldið riggaði avbera væl, og í ár ætla vit okkum at gera enn meira við ljóðumstøðurnar inni í tjaldinum, so at tónleikurin veruliga kemur til sín rætt, sigur Erik Biskopstø, sum samskipar tøknina á Summar Festivalinum.

Í fjør spældu bólkar sum Eyðun & Terji, Tvey av Kamarinum, The Dreams og aðrir í tjaldinum, og fleiri av framførslunum vóru framúrskarandi góðar.

**- horsdal**

# Ungt virki á ferð

**Í vikuni sýna bólkarnir, ið luttaka í Ungt virki sína verkætlan fram í nýggja handilsmiðdeplinum í Havn, Miðlon**

SKÚLI
Lív Højsted Horsdal
horsdal@sosialurin.fo

Verkætlanin Ungt virki er á hvørjum ári skipað sum ein kapping, har næmingar á Handilsskúlanum í Havn og á Kambsdali royna at skapa besta hugskotið um til eina spildurnýggja fyritøku. Bólkarnir, sum luttaka í kappingini í ár, sýna síni hugskot fram í hesi vikuni í nýggja handilsmiðdeplinum Miðlon í Havn.

Nógv áhugavert er at síggja á framsýningini hjá næmingunum í handilsmiðdeplinum. Eitt nú beltir, ið eru tilevnað úr gomlum slipsum, prýðislutir, nýtt føroyskt sjampo og sonevndar føroyskar vísorðakøkur, ið eru sprotnar úr teimum vælkendu køkunum – 'fortune cookies'. Somuleiðis hava nakrir næmingar úr Handilsskúlanum á Kambsdali tilevnað eitt føroysk borðspæl, Landsstríð, ið minnur nógv um væl umtókta borðspælið Risk.

– Spælibrettið er eitt landkort av Føroyum, men annars er spælihátturin júst tann sami, sum í Risk. Vit ætla at selja spælið í summar og hava bílagt 2500 eintøk. Henda verkætlanin hevur verið spennandi, stuttlig og lærurík.

Næmingarnar, Sosialurin hitti í Miðlon á miðdegi, vóru sera spentir til leygardagin, tí tá verður vinnarin av kappingini kunngjørdur. Í fjør vunnu næmingar á Kambsdali kappingina við hugskotinum til heimasíðuna www.ung.fo.

Vinnarin av kappingini skal luttaka í tveimum altjóða kappingum: – Dansk Industri, ið verður 21.-22. apríl, og Young Enterprise Europe, sum verður seinni í summar.




*– Í hvørjari køku er ein lepi við einum orðataki á, sigur Andrias Vang, ið stendur á odda fyri Vísorðakøkunum*




*Hesin bólkurin hevur framleitt eitt nýtt borðspæl. Teir ætla at selja øll 2500 eintøkini, teir hava framleitt*